


# Seta stikkið í

ORÐ: HØGNI MOHR
OG DÁNJAL HØJGAARD
MYNDIR: JENS KR. VANG

Fyri einum ári síðani bjargaðu teir 1.000 tonsum av mati á Rækjuvirkinum á Oyri. Høvuðs el-talvan á frystigoymsluni brendi saman, og í fýra samdøgur arbeiddu allir mans dag og nátt við, at projektera, byggja og seta upp eina nýggja el-talvu á Rækjuvirkinum.

Hetta er eitt gott dømi um virksemið á El-Talvuvirkinum í Norðragøtu. Hóast menninir hava ymiska útbúgving og til dagligt røkja ymiskar uppgávur, so kunnu teir í eini knappari vend ganga saman í eitt dynamiskt team, sum megnar at loysa stórar og átrokandi uppgávur.

Sum til dømis at byggja eina stóra og krevjandi eltalvu. Ella at gera eina størri umvæling av elektrisku skipanini umborð á einum fiskiskipi, har umráðandi er, at skipið sleppur til fiskiskap sum skjótast.

— Okkara stóri fyrimunur er, at vit eru so fleksiblir. Vit hava ikki tey vanligu fakmørkini, sigur stjórin á El-Talvuvirkinum í Norðragøtu, Eyðun Hansen.

-Allir menninir eru førir fyri at arbeiða við el-talvum. Og tá ið ein uppgáva sum hon á Rækjuvirkinum stingur seg upp, eru boð eftir øllum monnum, sigur hann.

**Kreppan kravdi nýhugsan**
Tað eru 17 ár síðani El-talvuvirkið lat upp í kjallaranum hjá Eyðuni Hansen í Norðragøtu. Endamálið var – sum navnið sigur – at byggja eltalvur; fyrst og fremst til føroyska marknaðin.

Og í 80-unum gjørdi virkið einki annað uttan el-talvur.

Byggivirksemið í landinum blómaði og eftirspurningur eftir el-talvunum úr Norðragøtu var stórur til bæði til nýggj skip, virkir og bygningar. Eitt skifti í 80-unum vóru tey eini 17 fólk á virkinum, sum hevði ein umsetning upp á átta milliónir krónur. Nógv tær flestu eltalvurnar í Føroyum vóru bygdar í Gøtu.

Men so kom kreppan.

Starvsfólkatalið minkaði niður í einki og sølan reyk í botn. Tískil varð neyðugt at finna upp á okkurt nýtt aftur at el-talvunum. Fyritøkan mátti finna sær nýggj bein at standa á.

**Fjøltáttað virksemið**
Í dag er virksemið á El-talvuvirkinum næstan líka stórt sum í teimum góðu 80-unum, og starvsfólkatalið er nærum tað sama. Men inntøkurnar koma í stóran mun frá øðrum virksemi enn el-talvum.

Afturat sjálvum el-talvuverkstaðnum er komin ein elektromekaniskur verkstaður. Harafturat hevur fyritøkan í dag nógv el-arbeiði umborð á skipunum, og dagliga virksemi fer í stóran mun fram uttanfyri sjálvt virkið.

Hendan dagin, Sosialurin var á vitjan, vóru níggju av teimum 16 starvsfólkunum til arbeiðis kring landið. Nakrir vóru í Vestmanna og umvældu pumpuskipanini á einum alibáti. Nakrir vóru umborð á einum fiskiskipini í Havn og monteraðu ein generator, og onkur var umborð á einum línubáti í Norðragøtu og arbeiddi uppá ein generator.

Í dag standa el-talvurnar bert fyri helvtini av umsetninginum hjá El-Talvuvirkinum. Spesialiseringin hevur verið noydd at víkt fyri sunnum handilsskapi, tí grundarlag er ikki longur fyri at framleiða el-talvur burturav.

— El-talvurnar eru sera svingandi, og tað er ikki grundarlag fyri somu framleiðslu sum í 80-ununum, tí tað er slett ikki sama byggivirksemi í dag, sigur Eyðun Hansen.


EL-VINNA. Teir eru nøgdir við at eiga bróðurpartin av føroyska marknaðinum, men halda seg vera ov smáar til tann útlendska. El-Talvuvirkið í Norðragøtu hevur fingið fleiri elektrisk bein at standa á, og ger seg nú út til oljuvinnuna

**Drúgvar royndir**
Sambært Eyðuni Hansen ger El-Talvuvirkið meginpartin av teimum nýggju el-talvunum, sum vera gjørdar til skip, virki og almennar bygningar í Føroyum. Seytjan ára drúgvu royndirnar koma virkinum í Gøtu til góðar, tá ið arbeiði verða boðin út her á landi, sigur stjórin.

— Viðurskiftini í Føroyum eru smá, og teir sum brúka okkum vita hvat vit standa fyri. Vit hava fingið ein øgiliga stóran serkunnleika í at byggja el-talvur, sigur Eyðun Hansen, sum leggur dent á, at El-Talvuvirkið í flestu førum er kappingarført í prísi.

Sambært stjóranum er tað ein stórur fyrimunur, at eltalvurnar verða bygdar í Føroyum. Tað er lættari at koma aftur um aftur við broytingum og tillagingum, tá ið arbeiði er gjørt í landinum.

— Hitt er bara ein kassi, sum kemur úr útlondum. Tað er einki annað, sigur stjórin, sum ásannar, at føroyingar eisini velja føroysku serfrøðina – júst tí at hon er føroysk.

**Eingin útflutningur**
Hinvegin er einki sum bendir á, at gøtumenn sjálvir fara út á teir útlendsku marknaðirnar at selja føroysku el-talvurnar.

-Vit dúva fyrst og fremst uppá at røkja føroyska marknaðin, sigur Eyðun Hansen, sum sær fleiri forðingar fyri útflutningi.

— Av tí at føroyski marknaðurin er so lítil megna vit ikki at spesialisera okkum so væl, sigur stjórin, og vísir á, at skal El-Talvuvirkið byggja el-talvur til útflutnings, má virkið vera ført fyri, at hópframleiða talvur. Og framleiðslan hjá virkinum í Norðragøtu hevur higartil verið grundað á smáar ordrar og stakar loysnir.

— Vit kundu ivaleyst hópframleitt til útflutnings. Men tað er ikki lætt at koma inn á útlendsku marknaðirnar, tí vit eru í einum øðrum landi enn tann projekterandi. Teir hugsa á sama hátt sum vit: at fyritøkurnar, ið gera arbeiði helst skulu vera lokalar.

Ikki tí.

El-Talvuvirkið í Norðragøtu hevur útflutt nakað av el-talvum tey seytjan árini virkið hevur verið í eldinum. Gøtumenn hava bygt eltalvur fyri eitt virki í Noregi, tá ið norska virkið ikki hevur havt orku at framleitt allar eltalvurnar sjálvt.

— Hetta er einasti mátin at sleppa út á marknaðin. Annars skulu vit sjálvir í holtur við at byggja upp eina marknaðarføring, og tað kostar nógvar pengar, sigur Eyðun Hansen.

— Skipini eru lívsæðrin í okkara virki, sigur Eyðun Hansen, stjóri í El-Talvuvirkinum í Norðragøtu

## Stigtakarin...


44 ára gamli Eyðun Hansen úr Norðagøtu er stjóri í El-Talvuvirkinum í bygdini. Tað var hann, sum í 1983 tók stig til, at byggja stórar el-talvur til skip, virki og almennar bygningar í Føroyum. Hugskotið fekk hann meðan hann arbeiddi sum skipselektrikari á skipasmiðjuni á Skála. Eyðun sá, at tað var einki til hindurs fyri, at føroyingar sjálvir bygdu tær stóru el-talvurnar, sum vórðu fluttar inn til landið í stórum tali.

Eyðun Hansen var eitt skifti í Norra og nam sær royndir á einum virki, sum bygdi el-talvur. Hann fekk sær útbúgving sum el-installatørur í Danmark, og í 1983 byrjaði hann einsamallur El-Talvuvirkið í einum kjallara í Norðagøtu.

## Oljan krevur blástempul

*El-Talvuvirkið miðar eftir at fyritøkan fær altjóða góðskustemplið ISO 9000 í ár.*

El-Talvuvirkið í Norðragøtu er farið í holt við at fyrireika seg til eina møguliga oljuvinnu.

Higartil hevur virkið kunna dúva upp á sítt navn í Føroyum. Men hetta verður ikki nóg mikið, um virkið skal gera seg galdandi í eini altjóða oljuvinnu. Tískil arbeiðir virkið fram ímóti, at tað skal vera ISO 9000 góðkent áðrenn hetta árið er umliðið.

Altjóða góðskustemplið er ein avgjørd fortreyt fyri, at kunna at vera við í oljuvinnuni, sigur Eyðun Hansen, stjóri.

— Oljufeløgini seta ISO 9000 sum krav, sigur Eyðun Hansen, stjóri, sum heldur, at virkið í Norðragøtu skuldi havt góðar fortreytir fyri, at klára seg í oljuvinnuni. Virkið hevur drúgvar royndir frá el-arbeiði umborð á skipum, og hetta skuldi komið virkinum til góðar í eini komandi oljuvinnu, heldur hann.

Eyðun Hansen dugir ikki reiðiliga at siga, hvussu framtíðin hjá virkinum fer at laga seg, um oljan kemur. Men hann ivast ikki í, at hon kann gerast ein rimmar avbjóðing fyri føroyskar el-fyritøkur.

Tørvurin hjá oljufeløgunum á el-arbeiði kann gerast so stórur, at tað kanska verður neyðugt at spesialisera seg meira. Eisini er hugsandi, at uppgávur fara at krevja so nógv fakfólk, t.d. elektrikarar, at neyðugt verður við samstarvi millum føroysku fyritøkurnar.

Men hóast gøtumenn fyrireika seg til komandi avbjóðingar, so hava teir eftir øllum at døma ikki fingið dollartekin í eyguni.

Eyðun Hansen sigur bart út, at hann hevur ongar ambitiónir um at gerast stjóri í eini velduga stórari fyritøku.

— Vit hava ikki visjónir um at blíva nógv størri enn vit eru í dag, sigur stjórin.


*Gamli generatorin á nátaskipinum, Mai, futtaði av. Tí er Tórhallur Hansen á El-Talvuvirkinum komin upp í leikin.*

*— Koparvindingarnar fóru, og tað slær ímillum og yvir í stell, sigur abbin á el-talvuvirkinum. Generatorurin verður kolldømdur, og teir fara at seta nýggjan í.*

## Fleiri bein

El-Talvuvirkið hevur bygt 1800 talvur síðani virkið byrjaði í 1983. Virkið arbeiðir saman við el-installatørum og el-deildum á skipasmiðjum og verkstøðum, sum framleiða maskinur til fiskavirki og skip. 16 fólk arbeiða á virkinum - el-installatørar, elektroteknikarar, skipselektrikarar, elektrikarasveinar og elektrikaralærlingar, goymslumaður og skrivstovufólk. Arbeitt verður á trimum høvuðsøkjum:

- **El-talvuverkstaður í Gøtu:**
  Tekna og byggja stórar eltalvur til skip, virkir og stovnar. Líka frá frá krafttalvum, stýristalvum og automatikktalvum til alarm- og eftirlitsskipanir.
- **Elektromekaniskur verkstaður í Gøtu:**
  Vikla, umvæla og halda viðlíka generatorar, elmotorar og transformatorar.
- **Tænastur:**
  Installera og halda viðlíka el-installatiónir umborð á skipum, so sum generatoranlegg, el-talvur, automatikkskipanir, køli- og frystiannlegg og brandávaringar.

## ...og skápið




Ein av teimum átjanhundrað el-talvunum, ið virkið hevur framleitt. Hetta er ein neyðstreymstalva.

Er streymurin burtur, syrgir talvan fyri, at dieselmotorur koblar til.

Skápið er eldvart millum øll rúmini.

Tekning, projektering, framleiðsla, uppseting og roynd krevur tilsamans einar fýrs arbeiðstímar.